Raðfesta høgt:

# Oljupengar til útbúgving og gransking

**Av teimum 85 mill. kr., sum oljufeløgini hava játtað at lata til førleikamenning av føroyskum vinnulívi frá 2000 til 2006, eru meira enn hálvthundrað mill. kr. eftir. Tær fara eins og nú at verða latnar til at førleikamenna vinnuna og her við serligum atliti til útbúgving og gransking**

OLJUPENGAR
*Jan Müller*

Mikukvøldið verður Oljuting hildið í Skálanum á Sjómansskúlanum. Evni á fundinum er: kann gransking, stuðlað av oljupengum, gagna verandi vinnum? Hvørjar treytir eru fyri brúk av oljupengum til førleikamenning og føroyska luttøku? Og hvør skal førleikamennast. Fyrilestrarhaldarar verða Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum og Petur Joensen, deildarleiðari á búskapar- og vinnudeildini í Oljumálaráðnum.

Hetta eru spurningar, sum hava verið frammi í almenna kjakinum áður. Eitt nú hevur verið funnist at, at umrøddu oljupengar ikki eisini fara til onnur endamál í samfelagnum so sum til mentanina. Petur Joensen, deildarleiðari á búskapar- og vinnudeildini í Oljumálaráðnum er tann, sum meira ella minni hevur umsitið hetta málið, síðani oljufeløgini fingu leitiloyvi í ár 2000. Hann váttar, at teir hava arbeitt við at gera eina skrivliga reglugerð fyri, hvussu farast skal fram í hesum málinum. Upprunaliga vórðu 85 mill. kr. í tí puljuni, sum oljufeløgini hava játtað at lata fyri at fáa leitiloyvi. Nakað er brúkt hesi bæði fyrstu árini og eftir at brúka til 2006, tá loyvini ganga út, er nakað væl omanfyri 50 mill. kr. skilst.

Í loyvunum stendur, at peningurin skal brúkast til vinnuliga førleikamenning innan olju- og gassídnaðin. Petur Joensen sigur, at hetta hevur so verið praktiserað eitt sindur víðari enn orðað hevur verið í loyvinum. Hetta er fyrstu ferð, at man hevur skula tikið støðu til slíkt og tí hevur man eisini roynt at finna skilabesta framferðarháttin. Ætlanin var ongantíð, at Oljumálaráðið skuldi umsita peningin sum so. Ætlanin hevur alla tíðina verið, at oljufeløgini sjálvi sum liður í føroysku luttøkuni í eini oljuvinnu, skuldu lata pengar til førleikamennandi verkætlanir innan vinnuna og síðani eisini fylgja málunum upp. Pengarnir, sum eru brúktir higartil, eru farnir til vinnumenning og til undirvísing og gransking. Ætlanin var so eisini, at oljufeløgini sjálvi skuldu engagera seg við at fáa føroysku vinnuna við í eina komandi oljutilgongd.

Uppá fyrispurning um tað er uppá tal at víðka karmin soleiðis at oljupengar eisini kunnu fara til mentanarligar verkætlanir og tiltøk sigur Petur Joensen, at tað hevur so ikki ligið í kortunum higartil. Skal hetta við oljupengunum praktiserast øðrvísi enn tað hevur verið gjørt, so er tað ein politiskur spurningur at fremja ta broytingina. Men sum sagt liggur tað so ikki í kortunum.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum váttar, at tey hava arbeitt við at gera eina neyvari reglugerð fyri játtan av pengum frá oljufeløgum, soleiðis at skipanin verður eitt sindur breiðari enn orðað í loyvunum. Men tað verður framhaldandi vinnan, sum verður í fokus, tá oljupengar verða latnir til førleikamenning. Men hann leggur áherðslu á, at har er so eisini talan um útbúgving og gransking, sum hann eisini heldur kann koma undir heitið mentan. Helst verður tað so, at gransking og útbúgving fer at verða uppaftur hægri raðfest, tá tað í framtíðini ræður um at lata oljupengar til førleikamenning.



*Petur Joensen, deildarleiðari á búskapar- og vinnudeildini í Oljumálaráðnum fer mikukvøldið at greiða frá, hvussu oljupengar í framtíðini fara at verða latnir til førleikamenning*
*Mynd Jens K Vang*



*Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum fer á Oljutinginum í kvøld at tosa um, hvussu aðrar vinnur kunnu fáa gagn av føroyskari náttúrvísindalig gransking við atliti til oljuvinnu*





# Nú er klárt til finaluna

**So var seinasta innleiðandi umfar »Nósabarnaprix2002« av. Ein stúgvandi fullur salur í bygdarhúsinum í Miðvági var karmur um enn eitt sera væleydnaða tiltakið**

BARNAPRIX
*Tíðindaskriv*

Óluva Dam, sum býr í Míðvági, vann kappingina fyri Vágar og verður sostatt síðsti luttakari, sum verður við í finaluna á Kambsdali tann 9.november. Óluva mátti skundisliga til Havnar beinanvegin sunnudagin, av tí hon skuldi í studio at syngja inn á fløguna, ið er um at vera klár at fara til prentingar.

Vit kunnu kanska siga, at hon longu hevur ein fingið forsmakk uppá, hvussu tað kennist at vera ein songstjørna.

Tað verða sotatt sjey luttakarar við til stóru finaluna, umframt at tey flestu hava kór og dansarar við sær á pallinum.

Luttakararnir verða: Bjarki Hansen (1 innl. umfar, Suðurstreymoy): »Lova mær við«, Ninna Katrin Johansen, (Eysturoy): »1000 Smíl«, Sólfríð Bech, (Suðuroy): »Kalla meg babe«, Olvheðin Jacobsen, (Norðoy): »Eingin er sum tú«, Sharon Zakariassen (2.innl.umfar, Suðurstreymoy): »Kingoson«, Durita Djúrhuus, (Norðurstreymoy): »Heimið«, Óluvá Dam, (Vágar): »Góða sig mær«

Okkara egna barnastjørna, Brandur Enni, og ungi guitaraúrmælingurin, Benjamin Petersen v.fl., verða eisini at síggja á pallinum hetta kvøldið.

Tiltakið verður í høllini á Kambsdali tann 9. november kl.19.00.

# Meira, meira, meira!!

**Clickhaze og Krit leiktu í Íslandi leygarkvøldið og fagnaðurin var stórur**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen/Myndir: Ingólfur Júliusson*

Meira, meira, meira!! Soleiðis ljóðaði, tá Clickhaze og Krit stóðu á palli á Grand Rokk í Reykjavík leygarkvøldið. Íslendski bólkurin Úlpa byrjaði, men greitt var, at tað vóru Clickhaze, ið fólk vóru komin at síggja. Í Íslandi tykjast tey samd við donskum fjølmiðlum, sum mettu Clickhaze millum bestu bólkar um okkara leiðir.

Eisini hjá Krit gekk væl og bólkarnir stóðu fyri framúrframførslum, siga heimildarfólk í Íslandi.




